Oyvindur Brimnes, Landsverk:

# Eitt trygt og optimalt ferðslukervi

**Eitt trygt og optimalt ferðslukervi krevur serstakar og tíðarhóskandi loysnir, segði Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, á kjakfundinum „Fyri og eftir Norðoyatunnilin“ sum var í Miðlahúsinum týskvøldið**

FERÐSLA & TUNLAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, vísti á vandamál og loysnir í samband við øktu ferðsluna, tá Norðoyatunnilin letur upp.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Týskvøldið skipaði Ráðið fyri Ferðslutrygd fyri kjakfundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Evnið á fundinum var „Fyri og eftir Norðoyatunnilin“

Fyrsta framløgan var tann hjá Oyvindi Brimnes, stjóra í Landsverki. Hann vísti á vandamál og loysnir í samband við øktu ferðsluna, tá Norðoyatunnilin letur upp. Hann legð i út við at vísa á framrokningar, sum vísa, at tað fara at koyra millum 1300 og 1500 bilar gjøgnum Norðoyatunnilin um samdøgrið.

Hann helt at nógva ferðslan í samband við tunnilin helst kemur at økja um trupulleikar, sum vit longu nú hava, og vísti hann t.d á smáu tunlarnir í Norðoyggjum, ið als ikki eru tíðarhóskandi longur. Har er einki annað at gera enn at gera ein nýggjan tunnil og vísti hann á eitt uppskot um ein tunnil norður um Fjall, frá Strond (Klaksvíksmegin) til Norðdepil.

Oyvindur vísti eisini á tey ymisku støðini, har vit longu nú hava trupulleikar við ferðsluni í Eysturoy og Streymoy sum t.d á vegamótinum í Gøtudali, har ein rundkoyring kundi loyst trupulleikan, og møguliga eisini ein tunnil úr Gøtudali inn í Skálabotn. Hann kom eisini inn á tey ymisku vandamilku vegamótini, har bygdavegir koma inn á landsvegin, og vísti hann á loysnir í hesum sambandi. Eisini vísti hann á, hvussu nógva ferðslan til Havnar kann loysast.

Í samband við ferðsluna í Leirvík vísti Oyvindur á hesar fýra ymisku loysnirnar: ein tunnil gjøgnum bygdina undir gamla vegnum, ein veg niðarliga í Leirvík, síðan vóru tvær ymiskar loysnir við vegi oman fyri bygdina. Í øllum hesum uppskotum verða akfør og bleyta ferðslan skild hvørt frá øðrum í mest møguligan mun.

Eitt trygt og optimalt ferðslukervi krevur serstakar og tíðarhóskandi loysnir, segði Oyvindur Brimnes at enda.

Eftir at allar framløgurnar vóru lidnar, varð kjakfundur. Í panelinum sótu Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu, og politistarnir Jan Fossaberg og Jan Poulsen.

Orðstýrari á fundinum varð Hilmar Jan Hansen.

Nógvir spurningar vóru settir til panelið. Serliga var tað tann nógva ferðlan í Sandavági, har ein landsvegur gongur beint gjøgnum bygdina, ið var samanborin við tað sum fer at henda í Leirvík, nú tunnilin letur upp. Ein av fundarluttakarunum, Jóhan Christiansen, bygdaráðslimur í Leirvík , segði, at eitt samt bygdaráð ynskti ta tryggastu og bestu loysnina, sum var ein tunnil undir gamla bygdavegnum.



*Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, og Jóhan Christiansen, bygdaráðslimur, søgdu, at eitt samt bygdaráð ynskti ta tryggastu og bestu loysnina, sum var ein tunnil undir gamla bygdarvegnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Politiið:

# Tryggari eftir Vágatunnilin

**Royndirnar hjá løgregluni eru, at ferðslan gjørdist tryggari, eftir at Vágatunnilin læt upp. Óttin fyri ikki at náa ferjuna er burtur og við tí eisini vandin, sum stóðst av hasardkoyringini og longu bilrøðunum**

FERÐSLA & TUNLAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Jan Fossaberg (t.v.) og Jan Poulsen, løgreglumenn, vænta, at ferðslan verður tryggari og vandin fyri ferðsluvanlukkum fer at minka, tá Norðoytatunnilin letur upp*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

„Fyri og eftir Norðoyatunnilin“ var heitið á fundinum, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd skipaði fyri í Miðlahúsinum týskvøldið.

Jan Fossaberg og Jan Poulsen politistar vænta, at vandin fyri ferðsluvanlukkum fer at minka, tá Norðoytatunnilin letur upp. Í hvussu er vóru teir báðir á einum máli um, at ferðslan gjørdist tryggari, eftir at Vágatunnilin læt upp.

Áðrenn Vágatunnilin sóust bilar ofta koyra við rúkandi ferð, fyri at náa ferjuna. Tað síggja vit ikki longur, og hasardkoyringin móti Oyrargjógv er nú burtur, vísti Jan Poulsen á. Jan Fossaberg var samdur við starvsfelaga sínum og segði, at fyrr tóku fólk nærmast "høvdið undir armin" í skundinum fyri at náa Sam ella Ternuna.

Hetta er óneyðugt nú, og í dag hava vit eina glíðandi ferðslu. Tað hevur eisini tann fyrimun, at vit í dag sleppa undan teimum sera vandafullu yvirhálingunum, sum stóðust av longu bilrøðunum í sambandi við ferjurnar, segði hann.

Jákup Suni Lauritsen, umboð fyri Felagskommununa í Vágum, var samdur við løgreglumonnunum í at ferðslan gongur bæði betur og tryggari í dag enn fyrr.

Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri:

# Ferðslumentanin broytt til tað betra

**Jákup Suni Lauritsen, umboðaði fyri Felagskommununa í Vágum á fundinum “Fyri og eftir Norðoyatunnilin“. Uppgávan hjá honum var at greiða frá í hvønn mun ferðslan er broytt og háttar sær í Vágum, síðani undirsjóartunnilin har læt upp**

FERÐSLA & TUNLAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*



*Jákup Suni Lauritsen, borgarsjóri í Sørvági*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvági, var samdur við løgreglumonnunum Jan Fossaberg og Jan Poulsen í, at ferðslan í Vágum gongur bæði betur og tryggari, eftir at Vágatunnilin læt upp.

Nógvir vóru vandarnir og vansarnir, sum fólk sóu fyri sær fóru at koma við Vágatunlinum, men rædslusøgurnar hava ikki hildið. Tvørturímóti hava positivar hugburðsbroytingar broytt ferðslumentanina til tað betra, heldur hann.

Hann nam eisini við ferðslutrupulleikan, sum leirvíkingar fáa at dragast við, tá Norðoyatunnilin letur upp.

Í Leirvík eru tey von við at ferðslan til og frá Dúgvuni at kalla gongur uttan fyri bygt øki. Hjá teimum verður nú ein heilt nýggj støða.

Vágafólk vóru á ein hátt "giraði" til ferðsluna, sum jú hevur gingið í gjøgnum bygdirnar í so nógv ár frammanundan. Miðvágs Kommuna hevur lagt seg eftir at gera nógv parkeringspláss fram við landsvegnum inni í bygdini. Men hóast tað parkera fólk ofta bilarnir beint uttan fyri handlarnar, tí tey tíma ikki at ganga tey fáu fótafetini, frá parkeringsøkinum til handilin.

Hetta er til stóran vanda og átti at verið tikið við eini heldur harðari hond, segði hann.

Sum íkast til kjakið um ferðslutryggar framtíðarloysnir fyri vegakervið, kom Jákup Suni Lauritsen við einum hugskoti, sum er vert at leggja merki til. Hann segði, at tilfarið úr einum møguligum tunli úr Vatnsoyrum til Fútaklett er júst tað sum krevst fyri at byggja flogvøllin út við.